**Sonja J. Jógvansdóttir**
**løgtingskvinna**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr 59/2015: Uppskot til samtyktar um dagføring í løgtingslógini um vernd av dýrum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at seta nevnd at endurskoða og dagføra djóraverndarlógina og grundað á tilmæli nevndarinsins leggja fram neyðug lógaruppskot í hesum sambandi.

**Viðmerkingar:**
Djóraverndarfelagið, aðrir felagsskapir og myndugleikar, sum vara av djórum, og onnur hava í áravís gjørt vart við, at løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 19. mai 2015, kallað djóraverndarlógin, er ótíðarhóskandi og verjir ikki djór nóg væl.

Dømi eru um, at djór eru fyri vanrøkt og mál eru fráboðað til løgreglu og aðrar myndugleikar, tó er ikki gjørligt at gera stórvegis við hesi mál, tí heimildir vanta í djóraverndarlógini ella í aðrari lóggávu. Sambært djóraverndarlógini hevur eigarin mangan einki galið gjørt, hóast djór líða undir hesum.

Neyðugt er at fáa greiðari reglur og ásetingar og møguliga eina greiðari og strangari revsilóg í samband við djóramisrøkt og djórapíning, og at dagføra djóraverndarlógina samsvarandi.

Heitt verður tískil á landsstýrismannin um at seta eina 5 mannanevnd til at endurskoða og dagføra djóraverndarlógina frá 1985, og gera tilmæli um broytingar sum heild. Endurskoðanarnevndin kundi verið mannað soleiðis:

- Løgfrøðiligur kunnleiki, Vinnumálaráðið (form.)
- Landsdjóralæknin ella annar djóralækni umboðandi Heilsufrøðiligu Starvsstovuna
- Umboð fyri privatu djóralæknarnar
- 2 umboð fyri djóraverndarfelagið (hesi skulu samskipa seg við onnur feløg, sum varða av djórum)

Ein hóskandi freist kundi verið, at nevndin varð liðug við tilmæli sítt í november 2016, so lógin kundi verið viðgjørd í tingárinum 2016.

**Á Løgtingi, 18. februar 2016**

Sonja J. Jógvansdóttir